# Credo

**- Vit vóru við á festivalinum í fjør. Tá søgdu vit, at vit vóru klárir at spæla aftur, um brúk var fyri tí. Í maimánaði fingu vit eini boð á heimasíðuni, myspace.com, har Eyðun Jacobsen skrivaði, »eru tit klárir at vera við í ár?« Vit svaraðu, »ja, tað eru vit,« fortelur Alvin Ellebye Andersen. Tað er frágreiðingin hjá Alvini Ellebye Andersen, um hví teir eru á Fjarða Festivalinum í ár**



Credo merkir, »eg trúgvi« á latíni, og hildu limirnir í bólkinum hetta vera eitt sera hóskandi navn til ein bólk, har allir eru trúgvandi

FJARÐA FESTIVALUR 08
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Bólkurin Credo varð stovnaður tann. 14. septembur 2003. Tað var í samband við Gospel Prix, ið varð hildið tá. Credo merkir, »eg trúgvi« á latíni, og hildu limirnir í bólkinum hetta vera eitt sera hóskandi navn til ein bólk, har allir eru trúgvandi.

Credo er mannaður við Hans Andriasi Olsen, Leivi Vitalis, Rógva Sivertsen og Alvini Ellebye Andersen.

## Úr tveimum samkomum

Tað sum kanska er heldur forvitnisligt við Credo, er at limirnir úr bólkinum eru úr tveimum ymiskum samkomum. Leivur og Rógvi ganga vanliga í Betesda, ið er brøðrasamkoma, meðan Alvin og Hans Andreas ganga í Soli Deo Gloria, sum er ein fríkirkja. Tað var Hans Andrias, sum bæði spælir trummur og syngur, sum tók stig til bólkin.

At byrja við, var tað serliga Alvin, ið gjørdi bæði orð og løg til sangirnar, men teir eru vorðnir meira saman um alt seinastu tíðina.

## Vildu vera við

- Vit vóru við á festivalinum í fjør. Tá søgdu vit, at vit vóru klárir at spæla aftur, um brúk var fyri tí. Í maimánaði fingu vit eini boð á heimasíðuni, myspace.com, har Eyðun Jacobsen skrivaði, »eru tit klárir at vera við í ár?« Vit svaraðu, »ja, tað eru vit,« fortelur Alvin Ellebye Andersen. Í fjør høvdu teir fleiri gestasangarar, men hesa ferð verða tað bert teir fýra, ið fara á pallin. Men sambært Alvini verður stílurin tann sami sum seinast.

## Frá poppi til rokk

- Tá vit byrjaðu at spæla saman spældu vit rættiliga popputtan tónleik. Men tá vit byrjaðu aftur, aftaná ein steðg fyri umleið eitt sindur meira enn einum árið síðani, broyttu vit stílin rættiliga nógv. Vit blivu meira elektroniskir og rokkuttir.

Tónleikurin hjá bólkinum minnir eitt sindur um amerikanska bólkin Red og eitt sindur um Carpark North eisini. Tekstirnir hjá bólkinum eru um meira døpru síðurnar av lívinum.

## Ólukksáliga penir

Menninir í Credo eru allir millum 22 og 24 ár, og sambært Alvini Ellebye Andersen, ávirkar tað tónleikin, at teir eru so mikið ungir.

- Eitt annað, sum ger okkum serligar, í mun til hinar bólkarnar, er at vit eru so ólukksáliga penir, sigur Alvin Ellebye Andersen, tá spurt verður hví fólk skulu koma at lurta eftir teimum.

Høg **góðska** lágur **prísur**

**SP/F Radiobúðin**
Heiðavegur 52 · Box 65
600 Runavík · Tlf 44 80 00



**PHILIPS FLAT ANLEGG**
MCM235B
- 2 x 5w RMS
- Radio
- Fløguspælara
- MP3 spælara

Einans **1.390,-**



**PIONEER bilstereo**
DEH-1000E
- Mosfet 50W x 4
- FM/AM Radio
- Avspælir: CD-R, CD-RW
- AUX í frontinum til m.a. iPod

Einans **950,-**



**GRUNDIG 32" flat sjónvarp**
32-6832
- Upploysn:1366x768p
- Responstíð: 6 ms (Góð mynd til fótbólt)
- Innbygt televarp (CA modul kostar 790 kr eykað)
- Antirefleks skerm (rekflekterar minimalt)
- 178° Sýnsvinkul (sæst frá øllum vinklum)

Einans **5.490,-**



**PHILIPS 26" FLAT SJÓNVARP**
26PFL-5522D
- Upploysn: 1366 x 768p
- Kontrast: 4000:1
- Innbygt televarp (CA modul kostar 790 kr eykað)
- Antirefleks skerm (rekflekterar minimalt)
- Aktiv kontrol (stillar seg inn eftir ljósinum í rúminum)
- Digital Crystal Clear (gevur sera góða mynd)

Einans **5.490,-**



**GRUNDIG FLAT RADIO**
Ovation 2
- Sera flott flat radio
- Spælir: CD / MP3 / WMA / USB-Stikk
- Kann hangast uppá veggjin
- Innbygdan subwoofer (bass)

Einans **2.590,-**

Alt í einum. Perfekt til kamarið



**AMITECH 22" FLAT SKERMUR**
- Innbygt televarp (CA modul kostar 790 kr eykað)
- Innbygdan DVD

Einans **3.990,-**

Sosialurin/KvR · tel 34 18 20